**Avritssíða til 8. venjing:** Styrkilandslagið í flokkinum

| | | | | | | | | | | *Navn* | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | | | | Kreativitetur | *Vísdómur* |
| | | | | | | | | | | Forvitni | |
| | | | | | | | | | | Víðskygni | |
| | | | | | | | | | | Er spurin | |
| | | | | | | | | | | Skilvísi | |
| | | | | | | | | | | Sosialt medvit | *Góðska* |
| | | | | | | | | | | Góðvild | |
| | | | | | | | | | | Fyrigeving | |
| | | | | | | | | | | Umsorgan | |
| | | | | | | | | | | Falsloysi | *Rættvísi* |
| | | | | | | | | | | Dirvi | |
| | | | | | | | | | | Ærligheit | |
| | | | | | | | | | | Leiðsla | *Treysti* |
| | | | | | | | | | | Eldhugur | |
| | | | | | | | | | | Áhaldni | |
| | | | | | | | | | | Samstarv | |
| | | | | | | | | | | Egintamarhald | *Hóvsemi* |
| | | | | | | | | | | Fyrilit | |
| | | | | | | | | | | Lítillæti | |
| | | | | | | | | | | Ansur fyri tí vakra | *Transendensur* |
| | | | | | | | | | | Skemt | |
| | | | | | | | | | | Bjartskygni | |
| | | | | | | | | | | Takksemi | |
| | | | | | | | | | | Spiritualitetur | |

**Avritssíða til 10. venjing:** Spyr & být um

*Spyr & být um*

Hvussu hevur tú tað,
tá ið tú brúkar styrkirnar?

*Spyr & být um*

Hvussu verður tín dagur, um
tú kanst brúka styrkirnar?

*Spyr & být um*

Sig eina søgu um, hvussu tú stutt
síðan brúkti eina styrki.

*Spyr & být um*

Hvørjar styrkir sært
tú í mær?

*Spyr & být um*

Hvussu kanst tú brúka
styrkirnar meira, tá ið
tú ert í skúla?

*Spyr & být um*

Hvussu kanst tú brúka
styrkirnar, tá ið tú hevur eina
stóra avbjóðing?

*Spyr & být um*

Hvussu kanst tú brúka
styrkirnar meira í frítíðini?

*Spyr & být um*

Hvussu kanst tú brúka
styrkirnar meira heima?

*Spyr & být um*

Hvønn týdning hevur tað fyri
okkara flokk, at vit hugsa um
styrkirnar hjá hvørjum øðrum?

*Spyr & být um*

Hvussu kann lærarin hjálpa
tær at brúka styrkirnar?

*Spyr & být um*

Hvussu kann eg hjálpa
tær at brúka styrkirnar?

*Spyr & být um*

Hvat kanst tú gera, soleiðis
at tú brúkar styrkirnar eitt
sindur meira í dag?

***Spyr & být um***

Hvønn týdning hevði tað havt fyri teg, um tú brúkti styrkirnar meira?

***Spyr & být um***

Sig eina søgu um, tá ið tú vart lítil og brúkti eina styrki.

***Spyr & být um***

Hvønn kennir tú, sum hevur somu styrkir sum tú?
Hvussu brúka tey tær?

***Spyr & být um***

Hvussu kunnu tínar styrkir hjálpa mær?

***Spyr & být um***

Hvat hevur tað at siga fyri teg, um tú kanst brúka onkra av styrkjunum, tá ið tú skalt gera eina uppgávu?

***Spyr & být um***

Hvussu kunnu styrkirnar hjálpa tær, tá ið okkurt er torført ella strævið?

***Spyr & být um***

Lýs teg, tá ið tú veruliga brúkar styrkirnar.

***Spyr & být um***

Hvussu kunnu vit gera meira við styrkirnar í okkara flokki?

***Spyr & být um***

Hvussu kunnu vit brúka styrkirnar meira hvønn dag?

***Spyr & být um***

Hvat hevur tað at siga fyri flokkin, tá ið tú brúkar tínar styrkir?

***Spyr & být um***

Hvørjar toppstyrkir heldur tú, at eg havi?

***Spyr & být um***

Til hvørjar uppgávur bæði í skúlanum og aðra staðir brúkar tú styrkirnar? Kanst tú brúka tær meira?

**Avritssíða til 10. venjing:** Spyr & být um

*Spyr & být um*

*Spyr & být um*

*Spyr & být um*

*Spyr & být um*

*Spyr & být um*

*Spyr & být um*

*Spyr & být um*

*Spyr & být um*

*Spyr & být um*

*Spyr & být um*

*Spyr & být um*

*Spyr & být um*

**Avritssíða:** Uppskot til kunning til heimið

Tann, / -

Komandi tíðina fara vit at leggja dent á trivnað og sjálvvirði í flokkinum. Í hesum sambandi fara vit at arbeiða við teimum 24 styrkjunum.

Næmingarnar fáa eina arbeiðsbók, sum eitur *Bókin um mínar styrkir*, og vit fara at arbeiða við tilfarinum í skúlanum. Dentur verður lagdur á at læra næmingarnar at síggja seg og hvør annan fyri tað góða, har vit taka støði í styrkjunum hjá hvørjum einstøkum næmingi og í flokkinum.

Arbeiðið tekur støði í teimum sonevndu 24 VIA styrkjunum. Hetta eru 24 styrkir, sum vit øll hava í okkum í størri ella minni mun. Styrkirnar eru hvørki heftar at trúgv, mentan, máli ella búseting. Undirvísingartilfarið tekur støði í skjalprógvaðari gransking, sum vísir, at tá ið vit arbeiða við okkara styrkjum, bøta vit um sjálvvirði og trivnað. Vit verða treystari, og vit megna betur at røkka okkara málum. Við hesum arbeiðinum vilja vit gera hvønn einstakan næming eins væl og flokkin sum heild tilvitaðan um, hvussu vit eru ymisk, og hvussu vit kunnu brúka ymisleikan og toppstyrkirnar bæði í skúlanum og uttan fyri skúlans gátt.

Vit arbeiða við venjingunum í *Bókin um mínar styrkir* í skúlanum, men vit heita á tykkum avvarðandi at hyggja í bókina og tosa við barnið um arbeiðið við venjingunum. Royndir vísa, at tað  at tað bøtir um trivnaðin í flokkinum, tá ið avvarandi eru við í arbeiðinum við tilfarinum.

Í sambandi við eina av fyrstu venjingunum, hava vit tørv á tykkara hjálp, tí tit kenna barnið best. Hugsið um eina hending ella eina støðu, sum tit minnast, har barnið var „í essinum“ – ein støða ella ein hending, har barnið var besta útgávan av sær sjálvum, har tað treivst, var hugbundið og hevði tað sera, sera gott. Tað kann vera ein hending, har tit hugdu at, ella ein støða har tit vóru við. Tit skulu antin skriva støðuna/hendingina niður ella tosa hana inn sum ljóðfíl – møguliga á telefonina hjá barninum. Minnist til at hava so nógvar smálutir við, sum til ber: hvar var barnið, hvat gjørdi tað, hvussu sýntist tað at hava tað o.s.fr. Hesa søguna skal barnið brúka í arbeiðinum við at finna sínar egnu styrkir.

Við gleða okkum at arbeiða við styrkjunum.

Vinaliga

Læraratoymið í ____________________